# DBU vil hava lønarloft

Formaðurin fyri danska fótbóltssambandið heldur, at tað hevði verið eitt gott hugskot við einum lønarlofti í fótbóltsfeløgunum. Í løtuni sita ríkmenn við borðendan í nógvum stórfeløgum, og teir gjalda ovurhondsstórar upphæddir til spælararnar. Allan Hansen heldur, at lønarútreiðslurnar hjá feløgum eiga avspegla veruligu inntøkumøguleikarnar hjá feløgunum.



# Real Madrid nærkast

Eitt skifti í ár var Barcelona 13 stig frammanfyri Real Madrid í sponsku landskappingini, men Barcelona hevur mist ferðina seinastu vikurnar, og eftir dystirnar um vikuskiftið eru bert fýra stig á muni millum feløgini. Barcelona tapti 4-3, og Real Madrid vann 2-0. Harvið er rættiligur spenningur aftur í sponsku landskappingini.

VÍF-Neistin 29-22 (17-14)

# Nú restar lítið í

**Við sigrinum í gjár eru vestmenningar bara eitt stig frá at tryggja sær pláss í finaluni. Neistin, sum hevur verið stórspælandi seinastu vikurnar, liggja nú brádliga á triðja plássinum**

HONDBÓLTUR
*Uni Holm Johannesen*
*uni@sosialurin.fo*

Nú restar lítið í hjá VÍF. Vestmenningar, sum hava verið einaráðandi í hesum kappingarárinum, eru bara eitt stig frá at tryggja sær pláss í finaluni.

Tað varð greitt, tá VÍF í gjár vann greitt á Neistanum, sum vitjaði í oddadysti í Vestmanna. Við stórspælandi Sámali Joensen og Agnari Joensen á odda var heimaliðið ikki til at steðga og vann, tá avtornaði, við sjey málum – 29-22.

### Omaná allatíð

Nógv ferð var á bóltinum fyrstu løtuna. Leikararnir tóktust allir at vera til reiðar, men tað var skjótt, at heimaliðið dró frá. Og teir vóru frammanfyri allan dystin.

Serliga í verjupartinum riggaði væl hjá heimaliðnum, og stóri og sterki Jugoslav Djumic hjá Neistanum fekk lítið pláss. Serbin stóð í alt fyri tveimum av málunum hjá Neistanum.

Í málinum vísti Eli Müller aftur spæl í serklassa. Hann vardi fyri óteljandi málmøguleikum, og serliga einu løtuna í fyrra hálvleiki stóð hann serstakliga væl. Tá eydnaðist Neistanum bara at skora eina ferð eftir tíggju minuttum.

Hálvleiksstøðan var 17-14.

### Heimaliðið økti

Í seinna hálvleiki øktu vestmenningar um leiðsluna. Beinanvegin vunnu teir seg seks mál framum, og síðan var eingin ivi. Neistin megnaði ikki at verja fyri Sámali Joensen og Agnari Joensen, sum skutu átta mál hvør.

Ein av glottunum hjá gestunum var Tróndur Kragesteen, sum saman við Birgiri Poulsen var toppskjútti hjá Neistanum við fimm málum. Hann stóð seg aftur hesaferð væl á bakkplássinum.

### VÍF í finaluni

VÍF verður allarhelst partur av mansfinaluni í 2009. Tað eru framvegis seks stig at spæla um, og vestmenningar hava fýra stig fleiri enn H71 og Neistin. Tá høvuðsstaðarfeløgini framvegis hava ein dyst innanhýsis, kann bara eina liðið vinna seg framum í stigatali. Komandi uppgávurnar hjá VÍF eru StÍF, KÍF og Kyndil – og tað er lítið sannlíkt, at teir ikki fáa stig burtur úr onkrum av dystunum.

Neistin, hinvegin, liggur nú á triðja plássinum. Og skal dysturin móti VÍF frá 18. januar spælast umaftur, eru teir seks stig frá oddaliðnum. Føroyameistararnir og nýkosnu steypavinnararnir eru í truplari støðu, tí hoyvíkingar hava vunnið sínar tríggjar seinastu dystir.

Neistin hevur ikki ráð at tapa fleiri stig. Tí stendur nógv á longu komandi vikuskiftið, tá Kyndil helst fer at gera alt fyri, at grannarnir ikki sleppa í finaluna.



*VÍF var ikki til at steðga í toppdystinum ímóti Neistanum í gjár, og nú restar bert eitt stig í hjá VÍF, so er finaluplássið tryggjað*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

## FAKTA um dystin

**VÍF-Neistin 29-22 (17-14)**
**10 min:** 7-5
**20 min:** 11-6
**30 min:** 17-14
**40 min:** 21-15
**50 min:** 24-18
**Málskjúttar**
**VÍF:** Agnar Joensen 8 (4), Sámal Joensen 8 (1), Áki Olsen 5, Joen P. Høgnesen 3, Niels Andreasen 2, Bjarti Hansen 1, Rúni Joensen 1, Dávur Magnussen 1 (1)
**Neistin:** Birgir Poulsen 5 (3), Tróndur Kragesteen 5, Karl Herup Olsen 4, Finnur Hansson 3, Áki Mørk 3, Jugoslav Djumic 2
**Brotskøst:** VÍF 7, Neistin 3
**Útvísingar:** VÍF 5, Neistin 1
**Dómarar:** Andreas F. Hansen & Eyðun Samuelsen

StÍF-KÍF 26-23 (13-8)

# StÍF greiddi sína skyldu



**Í einum týdningarleysum dysti greiddi StÍF sína skyldu, tá botnproppurin KÍF vitjaði**

*Dysturin millum strandingar og kollfirðingar hevði lítlan og ongan týdning, men aftur fyri vantandi spenningin fingu áskoðararnir nógv mál*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

HONDBÓLTUR
*Uni Holm Johannesen*
*uni@sosialurin.fo*

Bæði StÍF og KÍF hava havt millum lítið og einki at spælt fyri seinastu vikurnar. Tað merktist sanniliga eisini í høllini á Skála í gjár. Fáir áskoðarar og lág leikferð var sereyðkenni, tá strandingar vunnu við trimum málum á kollfirðingum, 26-23.

### Lítið bit í

Liðini fylgdust stóran part av dystinum, hóast StÍF alla tíðina var eitt vet omanfyri. Teir vunnu sær eina leiðslu beinanvegin í dystinum, sum teir varðveittu restina av tíðini.

Lítið bit var í verjuspælinum hjá báðum liðum, og alt ov ofta var lætt spæl. Tað bilti helst heldur einki, at áskoðararnir fingu nógv mál, tá spenningurin var burtur.

StÍF vann uppiborið og hevur nú 16 stig. Tað eru 10 stig fleiri enn KÍF, sum er á aftasta plássinum.

**StÍF-KÍF 26-23 (13-8)**
**StÍF:** Rúni Niclasen 7, Hávardur Trúgvason 5, Christian Preda 4, Jóanes Prestá 4, Bent Djurhuus 2, Mortan Hansen 2, Bárður Danielsen 1, Jørmund Joensen 1
**KÍF:** Regin Petersen 5, Niklas Reginsson 5, Suni Johannesen 4, Ási Dam 3, Teitur Joensen 3, Hallur Hansen 1, Jákup Trúgvason 1, Rógvi Weyhe 1